# t dansa



## Um bólkin

Trond Erics er norskur bólkur, ið hevur verið til síðan miðskeiðis í 80'árunum. Bólkurin hevur ment seg til eitt av bestu dansbandunum í Norðurlondum. Í 2005 gav bólkurin út fløguna Perleporten, og er tað hendan fløgan sum er orsøkin til, at Fjarðafestivalurin hevur bjóðað teimum hendanvegin.

Á fløguni eru kend løg sum vera sungin í ymisku samkomunum og verður hetta óivað eitt gott høvi at syngja við .

Trond Erics hava verið í Føroyum áður, í 1989 var Trond Erics á konsertferð í Føroyum. Trond Erics hava eisini á annan hátt vakt ans í Føroyum, í 1987 gav bólkurin út bandið Farvel Marita. Tittullagið á bandinum er síðan umsett til føroyskt, og hevur hittað stórt tvær ferðir, fyrst á bandinum hjá Jóannes & co., ið somuleiðis gjørdi ein vissan hr. Kim Hansen til eina kenda rødd í føroyskum útvarpi. Tá Kim í fjør gav sína Alt fløgu út, var hetta lagið sjálvandi eisini á henni, og gjørdist enn einaferð eitt giga hitt.

Trond Erics hava verið sera nógv spældir í sendingini "Hvat Nú" í Útvarpinum og so sjálvandi í "Upp á Tá" sum sendingin eitur nú. Eisini hava samrøður verið við bólkin í hesum sendingum.




### Góð minni úr Føroyum

Trond Erics var ein av teimum fyrstu bólkunum, ið spældu á festivalinum hetta árið.

Eftir framførsluna fekk Elis høvið at hitta bólkin. Teir vóru glaðir fyri at hitta ein føroying, tí teir høvdu nógv góð minni frá vitjanini í 1989, eitt nú bað táverandi gittarleikarin, Thomas Biller, Elis um at bera eina heilsu heim til Føroyar til eina kvinnu, ið hann hevði hitt á ferðini, og sum hann enn var líka forelskaður í.

- Við summum menniskjum følir man, at tey eru menniskjalig, at okkurt gott býr í teimum og tað ger man við Trond Erics, teir útstrála okkurt gott. Ja, hetta eru góðir menn, sigur Elis.

Men hetta eru eisini dugnaligir tónleikarar, bæði á hesi konsertini og fleiri konsertum síðan hevur Elis upplivað stak góðar framførslur frá bólkinum. Teir spæla altíð live, og hava ikki midi-fílar, eins og onkur annar ger, greiður hann frá.

- Tónleikurin hjá Trond Eric er lættar taktir, ið fella væl í oyra og tekstir um viðkomandi evnir. Man kann dansa til tónleikin, men líka væl hugna sær til hann. Dansbandtónleikur er gleðistónleikur, onkuntíð eru tekstirnir um sorg, men tað endar ofta gott, sigur Elis.

Tað, sum sambært Elis eyðkennur Trond Erics, er, at talan er um einfaldan tónleik, væl spældan og klárt sungnan við góðu røddini hjá sangaranum Lars Esbern Skogvald.

### Ikki vanliga dansiskráin

Tá Trond Erics vitja í Føroyum verður tað tó ikki við vanligu dansiskránni. Fyrst og fremst verður talan um løg av fløguni Perleportet, ein fløga ið bólkurin gav út eftir áheitan frá einum kristiligum felagsskapi. Bólkurin, ið vanliga ikki hevur verið roknaður sum ein gospelbólkur tók av áheitanini, og hevur síðan hetta spælt eitt nú til kirkjukonsertir við hesum løgum. Elis hevur prátað við teir um hesa útgávu. Teir greiddu frá, at hetta passaði væl til teirra. Teir eru allir giftir og hava børn, ið teir uppdraga eftir teimum kristnu virðunum. Á fløguni gera teir sínar egnu útgávur av gomlum kristiligum sangum. Elis væntar tó eisini, at okkurt annað av teimum meira álvarsligu løgunum hjá bólkinum verður á skránni, eitt nú yndislagið hjá Elis "Godt Voksen", ið handlar um at gerast eldri og gleðast um tað. Elis ætlar sær so í øllum ferum á festivalin í Skálabotni, fyri at uppliva allar hinar bólkarnar, men fyrst og fremst fyri at uppliva Trond Erics.